## Málverjin oyðilegði málið

Símun Samuelsen, sum beint fyri dystarlok syrgdi fyri, at Føroyar hóast alt fingu ein vakran enda upp á undankappingina, mátti eftir hetta hoyra nógvar glósur frá liðfeløgunum. Ikki minst, tí teir flestu vildu sáa iva um, hvørt talan var um eitt skot uppá mál, ella um tað bert var eitt hálvkiksað innlegg, sum málverjin beindi í meskarnar.

Men sjálvur var hann ikki í iva, tá vit spurdu hann um hetta.

- Tað var eitt skot upp á mál og ikki nakað innlegg. Sjálvandi var eg heppin, at bólturin fór inn, men tað skal so eisini til.

Tú hevði kanska heldur ikki so nógvar møguleikar at velja í í hasi støðuni?

- Nei. Bólturin varð spældur langt fram, og nart als ikki við hann, fyrr enn eg skeyt. Eg sá, at málverjin var í ferð við at flyta seg úteftir, tí hann væntaði eitt innlegg, og so smekkaði eg til. Eg royndi eisini at skrúva hann inn ímóti málinum, og tíbetur var hatta tann eina ferðin av túsund, at ein slík roynd eydnast.

So tú ivast ikki í, at málið skal standa í tínum navni og ikki sum sjálvmál?

- Nei, tað geri eg ikki. Eg eri púrasta vísur í, at bólturin hevði farið í málið, um málverjin ikki hevði nortið við hann, so í veruleikanum oyðilegði hann málið, segði ein avgjørdur Símun Samuelsen at enda.

**-mørk**



*Hepni var kanska við honum, men Símun Samuelsen ivaðist ikki í, at ætlanin var at fáa mál, tá hann skoraði til 2-1*

# Noyddur at reisa seg

**Jákup Mikkelsen ásannaði sjálvandi stóra brølaran, men hann legði eina við, at tað hjá sær bara ráddi um at gloyma mistakið og koma víðari í dystinum**

MÁLMANSDROPP
*Jákup Mørk*

Hóast tað hjá teimum allar flestu helst hevði togað sjálvsálitið nakað langt niðureftir, so helt Jákup Mikkelsen ikki, at hann hevði bestan hug at verða skiftur út, tá hann longu eftir 50 sekundum framdi ein av størstu brølarunum, sum royndi málverjin nakran tíð hevur gjørt.

- Sjálvandi var eg vónbrotin, og hetta var so absolutt ikki tað, sum eg hevði væntað av mær sjálvum. Men tað er einki at gera við tað, tá skaðin er hendur. Tú er noyddur at reisa teg, og sjálvur haldi eg, at tað er eitt eyðkenni fyri ein góðan málverja, at hann megnar at leggja mistøkini aftur um seg.

Og tað sá eisini út til, at liðið sum heild reisti seg væl hóast katastrofalu byrjanina?

- Tað var helst tað, sum eg óttaðist allarmest. At tað skuldi ganga útyvir spælið, soleiðis at menn gjørdust ótryggir, og til dømis illa tordu at leggja aftur til mín. Men tað hendi tíbetur ikki.

- Tvørtur ímóti, so stóðu vit øgiliga væl á vøllinum, og trýstið, sum vit høvdu roknað við fór at koma, kom ikki av álvara fyri steðgin. Kanska tí teir høvdu fingið eina slíka dreymabyrjan, sum teir ikki høvdu roknað við.



*Jákup Mikkelsen segði eftir dystin, at tað, sum hann ræddist mest, var at liðið kundi farið niður við høvdinum eftir katastrofalu byrjanina*

Og tit høvdu kanska eisini takið á dystinum eina góða løtu miðskeiðis í fyrra hálvleiki?

- Tað gekk øgiliga væl. Og vit fingu eisini pláss til at spæla. Teir vóru als ikki so agressivir, tá teir skuldu vinna bóltin, og tað hóvaði okkum sera væl. Somikið væl, at vit væl kundu javnað hesa løtuna.

### Kundi ikki henda

Um hendingina sjálva segði Jákup annars, at hann als ikki sá Benayoun, sum kom rennandi ímóti sær.

- Jón Rói leggur aftur, og tann maðurin, sum var í hølunum á honum, heldur fram at renna eftir bóltinum. Tí takið eg bóltin við mær burtur frá honum, og eg ansaði als ikki, at ein annar maður var har.

Og hatta er kanska eisini ein slík hending, sum kemur fyri eina ferð í lívinum?

- Ja. Um eg sá nakiað tílíkt í sjónvarpinum frá einum øðrum málverja, so vildi eg sagt, at hatta ongan tíð kundi hent fyri meg. Men tað gjørdi tað kortini. Tú kanst finna upp á allar møguligar umberingar, men tær eru bara nyttuleysar í slíkum føri.

# Hasir skuldu sitið

**Sum heild var Rógvi Jacobsen nøgdur. Bæði um undankappingina og um dystin leygarkvøldið. Men hann ásannaði, at hann skuldi fingið okkurt málið í Tel Aviv**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Jákup Mørk*

Størstu møguleikarnar at fáa Føroyar aftur í dystin leygardagin hevði Rógvi Jacobsen, sum tvær ferðir í fyrra hálvleiki varð spældur mest sum púrasta leysur móti ísraelska málinum.

Hvørga ferðina eydnaðist tó at senda bóltin í kassan, og sjálvur ásannaði Rógvi eisini, at hetta átti at kastað mál av sær.

- Sjálvandi skuldi eg skorað, og tað er keðiligt, at tað ikki eydnaðist at fáa bóltin inn. Fyrru ferðina royni eg leggja bóltin yvir til vinstra beinið, men eg missi eitt fet, og so kemur málverjin ov nær. Og tað seinna haldi eg var bara hepni hjá málverjanum, sum forðaði fyri, at bólturin fór inn.



*Rógvi Jacobsen ásannaði eftir dystin leygarkvøldið, at hann átti at fingið okkurt málið*

Hóast hann soleiðis iðraði seg um misnýttu møguleikarnar, so skerst ikki burtur, at Rógvi var millum teir allar bestu á føroyska liðnum. Ikki minst tí hann nú aftur fekk møguleikan sum sambinding millum miðvøll og álop.

- Tað er ein leiklutur, sum eg trívist sera væl í. Tað hevur eisini riggað væl, tá vit spæla 4-5-1. Ikki minst hjá mær, tí eg tá fái meira pláss, tá eg fari fram, heldur enn um eg liggi heilt frammi í eini 4-4-2. Talan verður ofta um gott pláss hjá mær at spæla á, tí hinir ivast, hvør skal taka meg, og tað vísir seg ofta sum ein fyrimunur.

Men er tað ikki eitt øgiliga stórt arbeiðsøki at hava, tá tú skalt vera bæði miðvallari og áleypari. Ikki minst, tá spælt verður í slíkum hita, sum tit gjørdu í gjár?

- Eg var eisini púrasta ferdigur móti endanum av dystinum. Talan verður um nógvar langar túrar, og serliga í einum slíkum dysti tekur tað ræðuliga nógva orku, helt hann.

- Hinvegin verður tað lættari, tá vit so hava eina so góða løtu, sum vit høvdu í fyrra hálvleiki. Tá verður meira spæl og minni rennarí, so á tann hátt hjálpir tað sera væl, tá vit fáa takið á dystinum, helt Rógvi Jacobsen at enda.

### Sterkur bólkur

Um HM-undankappingina, sum nú er liðug hjá føroyska liðnum, heldur Rógvi, at hendan sum heild hevur spælt nøktandi av.

- Sjálvandi vildu vit fegnir havt stig í heimadystinum móti Kypros. Tað var eitt vónbrot, at tað ikki eydnaðist, men í aðrar mátar haldi eg ikki, at vit kundu gjørt tað nógv betri. Tú skalt hugsa um, at vit høvdu nøkur sera sterk liði í okkara bólki, og tað hóskar okkum altso ikki serliga væl, um mótstøðuliðini spæla tekniskan fótbólt. Og tað gera Frakland, Ísrael og Sveis. Og Írland er jú eisini eitt sera sterkt mótstøðulið, so spurningurin er eisini, hvussu høgt vit yvir høvur kundu seta vónirnar.

- So mugu vit bara vóna, at vit til næstu undankappingina kunnu fáa okkurt mótstøðulið, sum vit kunnu taka stig frá, men hinvegin vóna vit sjálvandi eisini, at vit fáa okkurt av teimum heilt stóru liðunum.